# Spenningurin er stórur í Vestmanna

*Her heima er eingin, sum hevur staðið VÍF kurl seinastu tvey kappingarárini, og spenningurin til europeisku avbjóðingina er tí sum vera man sera stórur*




**Fríggja- og sunnudagin fáa VÍF-kvinnurnar sína helst størstu avbjóðing nakran tíð í felagshøpi, tá tær skulu tá royna seg í europeisku kappingini fyri steypavinnarar**

EUROPA-CUP
*Tíðindaskriv frá VÍF*

1. kvinnulið hjá VÍF fer á fyrsta sinni at royna seg í europeisku hondbóltskappingini fyri steypavinnarar. VÍF vann bæði steypa- og landskappingina seinasta kappingarár.

Hetta er fyrstu ferð síðani 1968, at VÍF- kvinnurnar hava vunnið 1. deild og tí varð avrátt, at tær skuldu luttaka í Europa-cup. Sjálvar valdu tær kappingina fyri steypavinnarar, og eru nógvar fyrireikingar gjørdar síðani hetta varð greitt seinasta vár. Millum annað er eitt stórt arbeiðið gjørt fyri at hetta skuldi bera til fíggjarliga. Her skulu vit nýta høvi at takka øllum teimum mongu stuðlunum, eins og ein tøkk verður veitt øllum teimum, sum hava staðið fyri tí ómetaliga umfatandi sjálvbodna arbeiði, ið gjørt er.

### Nógv venjing

VÍF-kvinnurnar hava nærum ikki havt støðg í venjingini síðani kappingarlok. Ætlandi skuldi Europa-cup kappingin byrja í november, men við tað at lutfallsliga fá lið meldaðu til, vórðu 1. og 2. umfar strikað, soleiðis at byrja verður í januar 2002 við triðja umfari. VÍF skal í hesum umfari leika móti Hellas úr Haag í Hollandi og verða báðir dystirnir leiktir í ítróttarhøllini í Vestmanna. Dystirnir verða ávíkavist fríggjakvøldið 11. januar kl. 18:00 og sunnudagin 13. januar kl. 16:00.

Umframt nógvu heimligu venjingina hava VÍF-kvinnurnar eisini verið á venjingarlegu í Danmark um ársskiftið. Har hava tær millum annað leikt ímóti tveimum liðum í 1. deild og einum liði úr Danmarkarseriuni. VÍF-kvinnurnar vunnu allar dystirnar.

Móti 1. deildarliðunum vunnu tær við ávikavist 2 og 3 málum og móti liðnum úr Danmarkarseriuni vunnu tær 41-22. Um tær so klára at gera nakað við steypavinnararnar úr Hollandi, má so bara tíðin fara at vísa. Í øllum førum er motivatiónin í lagi og liðandin er ógvuliga góður.

### Um Hellas

Hondbóltsfelagið Hellas er elsta og størsta hondbóltsfelagið í Haag. Felagið hevur uml. 300 íðkandi limir og luttaka í fremstu deildunum hjá bæði kvinnum og monnum – sokallaðu Eeresdivisiónini.

Hellas varð stovnað 15. mars 1927 og verður sostatt 75 ár í ár. Felagið hevur sítt egnu ítróttarøki, sum liggur í hugnaligum umhvørvi við sjóvarmálan. Eitt ítróttarumhvørvið, sum ger tað áhugavert hjá øðrum feløgum at koma har á eitt nú venjingarlegum.

Gjøgnum tíðina hevur felagið lagt sera stóran dent á ungdómsarbeiðið, og hevur hetta í nógv ár givið úrslit í, at felagið hevur havt nógvar landsliðsleikarar á øllum aldursstigum.

Endamálið hjá felagnum er at hava hondbóltsspælarar á høgum støði, samstundis sum pláss skal verða fyri áhugaleikarum, og sum skilst hevur hetta viðført, at »klimaðið« í felagnum altíð hevur verið stak gott.

Á elitusíðuni hevur serstakliga verið arbeitt nógv við kvinnuliðnum seinnu árini, soleiðis at hesar hava nátt oddinum í hollendsku kappingini. Í fjør vunnu tær steypakappingina og gjørdust nummar tvey í landskappingini, og í mun til liðið tá, er bert ein leikari farin frá.

Sagt verður annars um liðið, at tær tær leggja seg eftir at spæla á einum høgum tekniskum støði, og hetta hevur gjørt, at nógvir leikarar aðra staðni frá hava hug at koma til felagið.

### Eru skerdar

Í løtuni er Hellas á øðrum plássi í landskappingini eftir 11 dystir. Byrjanin uppá landskapppingina hevur verið eitt sindur trilvandi. Hetta tí at fýra av leikararunum hava verið knýttir at landsliðnum, ið hevur verið við í heimsmeistarakappingini í Italia í vetur. Hesar fýra eru eru Sylvia Hofman, Ingeborg Vlietstra, Pearl van der Wissel og Maaike Turnhout.

Hesar hava tí ikki verið nógv við til venjingarnar, saman við sínum liðfeløgum. Kann verða, at hetta er ein fyrimunur fyri okkara lið, tí sagt verður, at liðið enn ikki hevur funnið ta røttu rútmuna frá seinast kappingarári.

Liðið venur 5 ferðir 3 tímar um vikuna, umframt at fleiri av leikarunum venja arðar tíðir eisini, so roknast má við, at leikararnir eru í góðari venjing og at uppgávan hjá okkara kviku leikarum kann gerðast tung, men er vilji at vinna og kann okkara lið kann halda ferðini á egnum støði, kann nógv henda. Vit hava skjúttar og málmenn, ið kunnu eitt sindur av hvørjum.

Venjarin hjá Hellas seinastu tvey árini eitur Nico Stet. Nico hevur leikt við besta mansliðnum hjá Hellas í fleiri ár og hjálparvenjarin, Ingrid Huf , hevur somuleiðis leikt á besta kvinnuliðnum í fleiri ár.

Saman við hesum báðum og fysioterapeutinum, Rick Cost, er eisini formaðurin, Arjan Starrenburg, við í ferðalagnum.

Vestmenningar og vist hondbóltsáhugaðir føroyingar sum heild, eru ógvuliga spentir at síggja, hvat VÍF-kvinnurnar megna móti hollendsku steypavinnarunum.

Sum kunnugt, hevur liðið ikki tapt nakran dyst í nærum hálvt annað ár. Spurningurin er so, um tær megna at vinna seg fram til 4. umfar í Europa Cup kappingini. Livst so spyrst. Vónirnar eru í øllum førum góðar.

## EC-leikararhóparnir

### Hellas

| | |
|---|---|
| 1 | Ingeborg Vlietstra |
| 2 | Mirjan van Boles |
| 3 | Babette van Engelen |
| 4 | Pearl van der Wissel |
| 5 | Arjene Paap |
| 6 | Inge Stet |
| 8 | Judith Demeijer |
| 9 | Maaike Turnhout ( liðskipari) |
| 10 | Amy den Broeder |
| 11 | Sylvia Hofman |
| 14 | Mariska Schenkel |
| 16 | Dewi van ´t Oostende |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Nico Stet |
| Hjálparvenjari: | Ingrid Huf |
| Fysioterapeutur: | Rick Cost |
| Liðleiðari: | Anja Uijtdebroek |

### VÍF:

| | |
|---|---|
| 1 | Manuela Stan |
| 12 | Hallfríð Isaksen |
| 2 | Barbara á Rógvu |
| 3 | Sóley Mikkelsen |
| 4 | Fríða Marjunardóttir |
| 6 | Alis Høghamar |
| 7 | Nicolina Eyðbjørnsdóttir |
| 8 | Jórun Ludvig |
| 9 | Randi Kúrberg |
| 10 | Ioana Rápa |
| 11 | Nicoleta Radu |
| 14 | Jacklin Durguus |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Daniel Rápa |
| Hjálparvenjari: | Jørleif Kúrberg |
| Fysioterapeutur: | Sonja Skúvadal |
| Hallarlækni: | Petur Højgaard |

## Framskundað lokaluppgerð

Sum tað framgongur aðra staðni á síðuni, so verður seinni Europa-Cup dysturin hjá VÍF ímóti hollendska Hellas leiktur sunnudagin, komandi.

Sambært dystaryvirlitinum fyri januar mánað, sum vit prentaðu í leygardagsblað okkara, áttu mansliðini hjá VÍF og KÍF annars at leikt hendan dagin, men hesin dystur er nú fluttur. Dysturin verður ístaðin leiktur leygardagin, 12. januar, kl. 16.00.

**- jm**



UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:
## Argentina devaluerar

**Argentinska stjórnin hevur gjørt av at skriva virðið á landsins gjaldoyra, peso, næstan ein triðing**

Við hesari avgerðini er argentinska gjaldoyrað ikki bundið at virðinum á amerikanska dollaranum longur. Undan niðurskrivingini var virðið á peso og dollaranum tað sama, men eftir niðurskrivingina svarar ein dollari til 1,40 peso.

Jorge Remes Lenicov, fíggjarmálaráðharri sigur, at altjóða gjaldoyragrunnurin IMF hevði mælt stjórnini til at lata peso'in hava flótandi virði, men at stjórnin hevur valt at bíða við tí í fýra mánaðir.

Stjórnin í Buenos Aires boðaði herfyri frá, at hon gavst við at rinda avdráttirnar av uttanlandsskuldini, sum er um 1100 mia. krónur, men fíggjarmálaráðharrin sigur, at stjórnin fer at tosa við IMF og aðrar altjóða fíggjarstovnar í næsta mánað við tí fyri eyga at endurfíggja skuldina.

Avgerðin at niðurskriva peso'in í mun til dollaran fær stóra ávirkan. Hetta kemst m. a. av, at umleið 80 prosent av øllum lánum í Argentina eru tikin í dollarum, meðan lønir verða útgoldnar í peso. Stjórnin hevur tí gjørt av, at einstaklingar og feløg, sum hava lænt upp til 100.000 dollarar, fáa skuldina umskrivaða til peso við tí gamla virðinum t.v.s. pari.

# Tony Blair í Pakistan

**Indiskir vaktarmenn í Kashmir skutu í dag tríggjar menn. Indarar vilja vera við, at menninir vóru hernaðarligir muslimar.**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

Samanbresturin var tætt við bygdina Nigu í Budgamøkinum, og indiska herleiðslan sigur, at teir tríggir menninir vóru úr víðgongda muslimska loysingarfelagsskapinum Hizbul Mujaheddin.

Samanbresturin var, júst tá bretski forsætisráðharin, Tony Blair, kom til pakistanska høvuðsstaðin Ismalabad. Har skal hann tosa við Pervez Musharaf, forseta um tey spentu viðurskiftini millum tey bæði grannalondini.

Blair kom til Pakistan úr indiska høvuðsstaðnum New Dehli, har hann hitti Atal Behari Vajpayee, forsætisráðharra. Á fundinum fekk Blair at vita, at India er hugað fyri einari friðarligari loysn á kreppuni, men at Pakistan afturfyri skal binda seg til at gevast við stuðlinum til teir víðgongdu loysingarfelagsskapirnar í Kashmir.

India vil vera við, at Pakistan hjálpr teimum hernaðarligu muslimsku felagsskapunum í Kashmir, men tað avsannar stjórnin í Islamabad.

Amerikanska stjórnin hevur boðað frá, at hon tekur undir við royndunum hjá bretska forsætisráðharranum at fáa India og Pakistan til samráðingarborðið.

# Ein mió. flóttafólk fara heimaftur

**ST væntar, um næstan ein millión afghansk flóttafólk fara at venda heimaftur næstu tólv mánaðarnar**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

Sambært flóttafólkatalskvinnuni hjá ST, Maki Shinohara, eru fleiri túsund flóttafólk longu komin aftur til Afghanistan úr grannalondunum Pakistan og Iran.

Hon heldur, at millum fýra og fimm milliónir afghanar eru rýmdir av landinum seinastu tjúgu árini. Nógv teir flestu eru í Pakistan og Iran.

Maki Shinohara sigur, at seinastu tíðina eru millum 4.000 og 5.000 flóttafólk farin heimaftur um dagin. Tað leggur stórt trýst á ST, sum ger alt fyri at sleppa undan at savna tey í flóttafólkalegum í heimlandinum.

ST ber ótta fyri, at verða flóttafólkini savnað í legum, fara aðrir illa staddir afghanar at leita sær til legurnar.

# Vápnaskipið er helst úr Irak

**Vápnaskipið, sum ísraelsku myndugleikarnir hava lagt hald á, hevur helst heimstað í Irak.**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

Ísraelska stjórnin hevur sagt, at tað eru teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir, sum eiga skipið "Karine A", men sambært Loyds'List í London er hetta ikki so.

Loyds'List skrivar, at ein irakskur ríkisborgari, sum eitur Ali Mohammed Abbas, keypti skipið frá einum libanskum reiðaríi í august í fjør. Skipið æt tá "Rim A". Lloyds'List skrivar, at tey hava fingið hendur á skjølum, sum prógva, at Ali Mohammed Abbas yvirtók skipið tann 31. august.

Ísraelski herflotin tók "Karine A" í Reyðahavinum seinasta mikudag. Umborð funnu flotahermenninir 50 tons av vápnum. Ísraelska stjórnin sigur, at teir palestinsku sjálvstýrismyndugleikarnir eiga skipið, og at vápnini skuldu nýtast í bardaganum ímóti Ísrael. Hesum hava palestinsku myndugleikarnir víst aftur. Teir siga seg tvørturímóti als einki hava við skipið ella vápnini at gera.

Ísrael vil vera við, at vápnini umborð á "Karine A" eru úr Iran, men tað hava iransku myndugleikarnir avsannað.

Vápnalastin fekk fríggjadagin ísraelska forsætisráðharran, Ariel Sharon, at kalla palestinska leiðaran, Yasser Arafat, yvirgangsmann.

Búskapur og vinna:
# Bush lovar skattalætta

**Undir valstríðnum seinasta heyst lovaði George W. Bush amerikanarum skattalætta, varð hann valdur. Í gjár boðaði hann frá, at hann ætlar sær at halda orð, og tað er ikki eiti á lætti - heilar 11.000 mia. krónur**

Demokratarnir søgdu longu undir valstríðnum, at tað var púra burturvið at lova fólki stóran skattalætta, og teir taka heldur ikki undir við talinum, sum forsetin nú hevur nevnt.

Demokratiski leiðarin í Senatinum, Thomas Daschle, sigur, at skattalættin verður eitt bakkast fyri amerikanska búskapin. Daschle heldur, at skattalættin hjá forsetanum er alt ov umfatandi. Sjálvur tekur hann undir við einum



lítlum lætta fyri at avmarka ov stórt hall á fíggjarlógini.

Amerikanskir eygleiðarar siga, at stríðið um skattalættan kann fáa stóra ávirkan á valið til umboðsmannatingið. Tað verður í november.

Úr Norðurlondum:
## Fiskatorgið undir tak

**Tað kenda og søguliga fiskatorgið í Bergen er nú komið undir tak**

Í gjár flutti fiskatorgið inn í eitt 57 metrar langt tjald, har bergensbúgvar og ferðafólk nú kunnu keypa fisk, frukt og grønmeti. Har skulu torghandlarnir verða næstu tveir mánaðarnar, so tey keypandi og handilsfólkini kunnu fáa skjól fyri veðri og vindi. Málið er sjálvandi at fáa fleiri fólk at keypa á torginum.

Dagligi leiðarin í Torget Bergen, Arild Helland, sigur, at tjaldið er ein roynd at vita, hvat fólk í Bergen halda um tiltakið. Hann heldur, at riggar tiltakið ikki, noyðast fólk í Bergen eins og fólk aðrastaðni at ásanna, at tíðin er farin frá handilstorgum av tí gamla slagnum.

- Handilsfólkini standa ikki her, tí tað er ein gamal siður, men tí tey fegin vilja vinna pengar, sigur Arild Helland.

## Danskt reiðarí ákært

Danska reiðaríið T & C A/S í Svendborg er nú ákært í sambandi við tilburðin, tá farmaskipið "Thor Emilie" sakk av einari spreinging umborð í Miðjarðarhavinum tann 17. februar í fjør. Hinvegin hevur ákæruvaldið gjørt av at sleppa ætlanini at reisa ákæru ímóti stjóranum í reiðarínum, einum farmamanni og skiparanum, sum var tann einasti, sum slapp frá vanlukkuni á lívi.

Fimm sjómenn av Filipsoyggjunum og danski maskinmeistarin sjólótust.

Ákæruvaldið hevur ístaðin valt at reisa ákæru ímóti reiðarínum fyri brot á reglurnar um trygd á sjónum. Ákæruvaldið sigur, at farmurin varð ikki kannaður nóg gjølla.

Stjórin í T & C A/S, Per Nykjær Jensen, er fegin um, at ákæruvaldið hevur slept ákærunum ímóti einstaklingunum, men hinvegin dugir hann ikki at skilja, at ákæruvaldið hevur gjørt av at stevna reiðarínum.

Per Nykjær Jensen heldur uppá, at sveitsiska felagið Glencore má ábygjast fyri vanlukkuna, tí felagið greiddi ikki skiparanum frá, at farmurin var tað sera vandamikla evnið "zink skimming". Sjálvur helt skiparin, at skipið hevði tað vandaleysa "zink ore" í lastini.